# Heavy Mojo vann The Global Bat

**Tað gjørdist Heavy Mojo úr USA, sum vann The Global Battle Of The Bands, ið varð hildið í The London Astoria í gjárkvøldið**

GBOB
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Heavy Mojo úr USA fór við sigrinum, teimum $100.000, heimsumfatandi konsertferðini, teimum trimum gittarunum frá Gibson og heiðrinum vinnari av The Global Battle Of The Bands. Støðið í finaluni var høgt og heilt til síðstu løtu var púra ógreitt hvør vinnarin fór at verða. Tí hóast fleiri bólkar vóru heilt góðir, so var eingin veruliga framúrskarandi.

Tó skal eg viðganga, at tá Heavy Mojo fór av pallinum eftir eina sera lívliga framførslu av sínum heilt egna blandi av rappi og rokki, so hugsaði eg, at tað skuldi ikki undra meg um hesin bólkur fór at vinna. Fyrra lagið hjá bólkinum var ok, kanska ikki besta lagið á kvøldinum, men rættiliga egið, meðan seinna lag var ein kókandi hip rokk, orku veitsla, sum riggaði avbera væl. Teir tríggir rapparnir rappaðu ordiliga væl og komu veruliga út um pallkantin. Bólkurin aftan fyri teir spældi væl, og dómsnevndin greiddi frá, at orsøkin til, at hesin bólkur varð tikin framum allar hinar góðu bólkarnar, var, at hetta var tann bólkurin, ið var mest til reiðar, ella sum teir søgdu – Most ready to go!

Hesin ummælarin undrast meira um úrslitið á øðrum plássi. Spanski bólkurin Sixteenth Solid Spread spældi rættiliga væl, men sangarin var langt frá sannførandi. Tónleikurin var eitt slag av málmstulking av stílinum hjá Depeche Mode. Ljóðaði nokkso modernað og var fínasta slag. Bólkurin fekk gott lív í fólk, og hevði eitt hvast men gott ljóð. Stílurin var rættiliga langt frá øllum hinum á kvøldinum, men eg metti stutt og greitt, ikki at hetta var nóg gott til at teljast millum betru bólkarnar.

Japan og bólkurin Flare Odds fingu triðja pláss fyri eina fína og sera egna framførslu. Minti eitt sindur um White Stripes í útrykki, men tó uttan at líkjast ov nógv. Tónleikurin var eitt slag av japanskari harðari rokk tulking av bretskum 80'ára poppi. Tónleikaliga var bólkurin ein av mest spennandi upplivingunum og hevði sítt egna boð uppá tann rokkin, ið er uppi í tíðini júst nú.


*Líggjas Olsen sang bæði løgini hjá Deja Vu, og hesum slapp hann væl frá*

Tann slagið av rokki, sum nøvn sum eitt nú Killers hava gjørt væl umtóktan, var sera væl umboðaður á konsertini, hetta tykist at vera tað, sum rørir seg mest á tónleikapallinum kring allan heim. Men eingin bólkur hevði eitt so sannførandi boð uppá hesa tónleikagrein, sum Electric Co. úr Mexico. Bólkurin spældi henda skjóta, skitna rokk so sera sannførandi. Við ein oddamanni, ið var ein av teimum bestu á kvøldinum, var tað eisini hóskandi, at hesin bólkur fekk 4. pláss.

5. Plássið býttu Cody úr Danmark og The Broken Hearted úr USA millum sín. Cody var við sínum fólkarokki, bólkurin, ið vann á The Dreams í donsku finaluni, og bólkurin var eisini veruliga góður. Sangarin sang væl og tónleikurin var fittur og penur. Ein gjøgnumførdur bólkur, ið hevði uppiborið at verða nevndur. Løgnari var, at The Broken Hearted taldust millum teir fremstu við sínum larmi rokki. Bólkurin rættiliga góður, men var als ikki ein bólkur, ið veruliga breyt frá øllum hinum bólkunum innan tónleikagreinina, ið eitt nú Mexico eisini ferðaðist innan.

Framførslan hjá Deja Vu var sum so rættiliga góð. Bólkurin spældi væl og løgini eru góð, tó var langt frá frálíka ljóðinum í ljóðroyndini til konsertljóðið. Ljóðið var rættiliga keðiligt, onkri ljóðføri vóru ov hart frá og onnur ov spakuligt frá. Hetta var sera skuffandi, tí ljóðroyndin hevði verið so øgiliga



*Amerikanski bólkurin Heavy Mojo vann við sínum heilt egna blandi av rappi og rokki*